

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 12 - 2012

# Tólv oljufund á norska landgrunninum

Hóast tað skjótt eru 50 ár síðani, at fyrsti borurin varð settur í norsku undirgrundina, og eitt stórt tal av olju- og gasskeldum eru funnar, so tykist einki benda á, at norska oljuævintýrið er av. Tað verða framhaldandi gjørd nýggj oljufund, og 2012 er einki undantak í so máta. Higartil í ár eru gjørd 12 nýggj oljufund á norska landgrunninum, tvs. í Norðsjónum, í Barentshavinum og í Norskahavinum. Tilsamans eru boraðir 27 leitibrunnar. Hetta merkir eina sokallaða fundratu uppá 44%. Aftrat hesum koma avmarkingar- og metingarbrunnar. Statoil er tað felagið, sum hevur borað flest brunnar, íalt 11 leitibrunnar. Næst er Lundin við 7, Wintershall við 6 brunnum og Det Norske við 4. Hini feløgini, sum hava borað ein og tveir brunnar eru - Eni,Total, BP, Centrica, Dong, Faroe Petroleum, Lotos, Mærsk, Noreco, RWE Dea, Suncor og Talisman. Størstu fundini, sum eru gjørd í hesum árinum, eru Havis í Barentshavinum og Johan Sverdrup í Norðsjónum. Johan Sverdrup risafundið, sum er størsta oljufundið í heiminum í ár og millum tey størstu í norsku oljusøguni, hevur styrkt trúnna uppá, at nógv olja framvegis liggur goymd í undirgrundini í Norðsjónum. Og nýggj fund í Barentshavinum hava latið upp fleiri dyr til eitt spildurnýtt oljuævintýr í hesum nýggja og velduga arktiska økinum. Áhugavert er at bíta merki í, at bæði tey føroysku oljufeløgini, Faroe Petroleum og Atlantic Petroleum nú hava dótturfeløg í Norra, sum eru við í norsku oljuleitingini.